## Sølvi um valstríðið til Løgtingsvalið

Tað er áhugavert at fylgja við valstríðnum. Men tað tykist, sum um tað higartil hevur koyrt meiri uppá persónar, enn evnir. Vit hava ikki sæð nógvar orrustur um tey stóru evnini enn.



## ... um ferðsluna á landsvegunum

Í tí stutta og heila vil eg siga, at bilførararnir í Føroyum koyra væl. Eg koyri uml. 45.000 km. um árið, og eg vil siga, at fólk flest koyra skilagott og vísa fyrilt fyri hinum í ferðsluni.

# Sølvi ynskir stríðsval til Í

**Grundigi og siðiligi ítróttarmaðurin, sum hevur virkað sum ítróttarráðgevi hjá ÍSF í fimm ár ynskir, at eitt ella fleiri valevni stilla upp til forsetasessin í ÍSF. Eisini fyri at fáa eitt gott og mennandi tjak um framtíðina hjá ítróttini í Føroyum**



## Ítróttarprofilurin



**Heri Simonsen**
heris@sosialurin.fo

"Ongin hevur heitt á meg um at stilla upp til ÍSF-forseta. Eg stilli upp av einslystum, og tí eg haldi tað verða eitt sera áhugavert og gevandi starv. Men eg geri tað fyrst og fremst, tí eg ætli mær at gera nakað munagott fyri ítróttina í Føroyum!". Vit eru inni hjá Ráðnum Fyri Ferðslutrygd, Yvir við Strond í Havn. Sølvi Reinert Hansen hevur skift starvið, sum ítróttarráðgevi í ÍSF út við starvið, sum dagligur leiðari hjá Ráðnum Fyri Ferðslutrygd. Men hann brennur enn fyri at arbeiða ítróttinum til frama. Síðani hann bleiv kunngjørdur, sum valevni hava fleiri ítróttarfeløg sent honum teldupost, har tey siga, at tað var gott, at hann stillaði upp til komandi ÍSF-forsetaval. Men Sølvi er botnærligur! Hann ynskir ikki ein ÍSF-aðalfund har øll reisa seg upp og klappa fyri honum, sum nýggjum ÍSF-forseta. Hann ynskir, at eitt ella fleiri valevni koma á vøllin. Hetta fyri at fáa eitt, gott og mennandi tjak um framtíðarstøðuna hjá ítróttini í Føroyum. Men enn bíðar Sølvi eftir einum mótvalevni.

### Ítróttarálit

Sølvi varð limur í arbeiðsbólkinum, sum í 2005 handaði Føroya Landsstýri álitið um "Almennan ítróttarpolitikk í Føroyum". "Tær almennu Føroyar kunnu bara handla, um tær fáa at vita hvat ítrótturin vil. Vit mugu styrkja arbeiðið úti í feløgunum, og í sersambondunum." Sølvi metir, at Fótbóltssambandið er í einari serstøðu tá tað kemur til at skipa eina organisasjón. Sølvi metir, at ein leistur kundi verið, at t.d. 3 smærri sersambond deildu ein løntan skrivara. Ein annar leistur kundi verið at ÍSF hevði starvsfólk við ymsum førleikum, sum kundu servisera øllum sersambondunum. Hann letur ongin iva verða um, at hann ynskir meir organisering og strukturering innan ÍSF.

### Uppvaksin á 3 støðum

Umframt at hava verið ein fjølbroyttur ítróttarmaður, so hevur Sølvi eisini havt ein fjølbroyttan uppvøkstur. Tey fyrstu 11 árini frá 1970 til 1981 vaks hann upp í Havnini. Í 1981 flutti familjan til Hull í Onglandi. Hull er væl kendur millum eldri fiskimenn, og tað var eisini har Julian Johnson var yrkisleikari. Teir fyrstu 3 mánaðarnir vóru tungir fyri Sølva. Hann dugdi einki enskt, og bara eitt sindur av donskum. Men ein hegnig og dugnalig lærarinna hjálpti honum á glið. Hon tók fleiri myndabøkur fram, bað Sølva siga sær orðið á føroyskum, og so segði hon sama orðið á enskum. Og longu aftaná 3 mánaðir varð Sølvi komin á lagið. Sølvi er í dag glaður fyri árini hann hevði í Onglandi. Hann metir, at um foreldur hava tíð og umstøður, so er eitt uppihald í einum øðrum landi, við einum øðrum tungumáli, ein tann besta gávan ein kann geva børnunum. Sølvi leikti fótbólt við javnaldrunum á skúlaliðnum. Hann hevði tað stóru uppliving at vinna steypakappingina fyri skúlalið í Hull. Tá búðu uml. 400.000 fólk í Hull.

Tá Sølvi varð 14 ár, flutti hann saman við familjuni til Saltnes. Mamman Judith, sum er fødd Reinert Petersen, er av Saltnesi, og pápin Meinhard er av Nesi. Sølvi er yngstur av 6 systkjum. Tey eru tríggir brøður, og tríggjar systrar. Eldru brøðurnir, Jákup og Dávid eru eisini væl kendir í føroyska samfelagnum. Annar, sum sóknarprestur á Sandi, og hin sum stjóri í báðum undirsjóartunnlunum.

### B68 og Sólmundur

Heimkomin byrjaði Sølvi at leika við B68. Men í 1987 valdi hann at satsa uppá kappróðurin. Hann róði við Sólmundi frá 1987 og til 1990. Í 1987 og 1988 gjørdust teir nr. 2 í FM-kappingini. Ì 1989 og 1990 vunnu teir Føroyameistaraheitið. Í 1990 gjørdu teir reint borð, og vunnu allar róðrarnar! Eftir hetta fór Sølvi at renna. Hann varð við á Oyggjaleikunum í Álandi í 1991,

Sosialurin